## So fer fótbólturin veruliga á rull

**Formula Deildin:**

| Dato: | Dystur: | Dómari: |
|---|---|---|
| 29.03 | B36-ÍF | (Petur Reinert) |
| 30.03 | EB/Streymur-KÍ | (Jens P. Brattalíð) |
| 30.03 | HB-Skála | (Lars Müller) |
| 30.03 | NSÍ-B71 | (Eiler Rasmussen) |
| 31.03 | Víkingur-B68 | (Ransin Djurhuus) |

**Hjá 1. Deild monnum**

| Dato: | Dystur: | Dómari: |
|---|---|---|
| 29.03 | AB-EB/Str. | (Eiler Rasmussen) |
| 29.03 | TB-B68 | (Birgir Sondum) |
| 29.03 | 07 Vestur-KÍ | (Høgni Hansen) |
| 29.03 | Víkingur-HB | (Bárður Mortensen) |
| 30.03 | VB/Sumba-NSÍ | (Rói Jacobsen) |

HB – Skála:

# Bæði vænta týdningarmiklar leikarar

**Fróði Benjaminsen er leikbannaður hjá HB, meðan loyvini hjá nýggju útlendingunum á Skála framvegis ikki eru komin í rætt lag**

UPPTAKT
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

Á heimavølli er líkamikið hvat mótstøðuliðið er, tí tá er ein sigur eitt krav. So greiður er liðformaðurin hjá HB, Jákup á Borg.

– Og tey trý stigini eru eisini tað, sum hevur fyrsta prioritet, staðfestir Jákup, sum sjálvandi vónar, at góða spælið eisini fylgir við.

Til uppgávuna í Gundadali sunnudagin er HB væl fyri. Einasti leikarin uttanfyri er Fróði Benjaminsen. Hann varð rikin av vølli í steypakappingardystinum móti ÍF herfyri, og er tískil leikbannaður sunnudagin. Tískil kemur tað væl við, at Rasmus Nolsøe er við at koma fyri seg. Hann hevur havt trupulleikar við lærkrikanum, og var ikki við í steypakappingardystinum í Fuglafirði. Men hóskvøldið vandi hann aftur við fullari ferð, og hann er eisini partur av hópinum, sum tekur móti Skála í Gundadali sunnudagin.

### Pauli neyvan tøkur

Á Skála hevur venjarin John Petersen fleiri trupulleikar. Endaligu loyvini hjá teimum báðu nýggju útlendsku leikarunum ikki vóru komin í rætt lag á middegi í dag, og tí er tað ógvuliga ivasamt um roknast kann við teimum. Eisini er tað sera ivasamt, hvussu verður við liðformanninum Pauli G. Hansen, sum hevur havt trupulleikar við lærkrikanum. Hann er í bata, men John Petersen sigur seg ikki tora at rokna við Paula sunnudagin.

Harnæst má John Petersen síggja burtur frá fleiri øðrum leikarum, sum ikki eru byrjaðir at venja rættiliga enn, tí hondbóltsárið akkurát er endað.

Tí sær tað ikki meiri enn næstbest út á Skála, og spurdur ítøkiliga, hvat eitt gott úrslit hjá teimum er, svarar John Petersen speiskliga, at teir neyvan vinna stórsigur í Gundadali. Síðani verður tónin álvarsamari og John Petersen heldur soleiðis fyri:

– Vit vita fullvæl, at vit eru uppi ímóti einum av stórfavorittunum til gullið í ár. Men hóast talan eisini er um ein dyst á útivølli, so ætla vit okkum stig og eina góða byrjan upp á árið.





# Søgan endurtekur seg

**Ivi er um onkran lyklaspælara hjá NSÍ, sum eisini í fjør hitti B71 í fyrsta umfari**

NSÍ-B71
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialrin.fo*

Fyrsta fetið og fyrstu stigini á FM leiðini hjá NSÍ í fjør vórðu tikin á Sandi. Talan var um sera tætta uppgerð, har NSÍ í yvirtíðini skoraði sigursmálið.

Sunnudagin hittast hesi bæði feløgini aftur í fyrsta umfari. Nú eigur NSÍ heimavøll, og teir í Runavík eru favorittar. Meistararnir stóðu ikki royndina í fyrsta umfari í steypakappingini. Teir taptu á útivølli ímóti EB/Streymi undir torførum umstøðum, har spælið hjá teimum var gott stóran part av 1. hálvleiki. Harvið snýr tað hjá NSÍ seg bara um landskappingina og verjuna av FM heitinum.

Uppgerðin í Streymnesi var kostnaðarmikil á tann hátt, at tveir av teimum fyrstu ellivu vórðu skaddir. Hjalgrím Elttør noyddist av vøllinum við liðbandsskaða, og hann hevur ikki vant í hesi vikuni. Hóskvøldið rann hann, meðan hinir vandu. Í morgun var ikki greitt, um Hjalgrím verður førur fyri at spæla sunnudagin.

Serbiski álopsspælarin Dejan hevði risa møguleika at skjóta mál í Streymnesi, men tað eydnaðist ikki. Hóskvøldið var Dejan ikki til venjingar. Hann hevur trupulleikar í einari tá, og tað er ivasamt, um hann verður førur fyri at spæla. Upplagdi avloysarin er Øssur Dalbúð, sum í dag hevur 19 ára føðingardag.

Eftir at B71 á heimavølli hevði verið aftanfyri ímóti B68, eydnaðist tað í síðstu løtu at javna og í longdu leiktíðini at skjóta sigursmálið.

Sandoyingar kenna seg at vera væl fyri. Teir verða heilt væl nøgdir, um tað eydnast teimum at fáa stig við Løkin. Um teir megna at halda tørn út í 2. hálvleik, og NSÍ so fer at spenna álopsbogan, so kann alt koma fyri!